# Søgulig viðgerð av persónum

JÓGVAN SUNDSTEIN



Sosialurin gjørdi eina viðtalu við høvundan av bókini um Sambandsflokkin í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið hjá flokkinum.

Yvirskrivtin kom at ljóða, at »tað hevði kanska verið meira saft og kraft í at skriva um Jóannes Patursson«. Hetta fekk Rolf Guttesen at fara í blekkhúsið (nú eitur tað til telduna) og skuldsetur Sosialin fyri, at hann í yvirskrivtini »voldtekur grovliga sakina«. Tær viðmerkingar Rolf Guttesen síðani hevur um Jóannes Patursson hava so havt til fylgju, at umrøðan síðani meira hevur snú seg um Bóndan enn um Sambandsflokkin.

Eg hevði stutta grein í Sosialinum, hvar eg hevðist at orðavalinum hjá Rolfi Guttesen. Tað kom eitt aftursvar frá Rolf 25.august, sum tó ikki innihelt nakað serligt nýtt enn tað, at eg hevði eina grunna søguvitan og var óvitandi um nazisympatiir hjá ávísum persónum.

Tað er møguligt, ja helst sannlíkt, at Rolf hevur størri søguligan kunnleika enn eg havi, men harfyri havi eg væl loyvi til at reagera út frá tí kunnleika eg havi, og ikki minst út frá tí hugburði eg havi um vanligan fólkaskikk, tá ein skal skriva um søgulig fyribrigdi og ikki minst um persónar.

Jóannes bóndi varð væl drigin fram í viðtaluni í Sosialinum, tí hann var ein persónur, sum var ein mótsetningur til Sambandsflokkin og helst í veruleikanum eisini beinleiðis orsøk til, at Sambandsflokkurin varð stovnaður. Tað var jú hann, sum á Fólkatingið arbeiddi fyri meiri sjálvræði til Føroya Løgting og kom við »Tilboðnum« í góðum samskifti við táverandi danskar politikkarar. Sambandsflokkurin varð stovnaður fyri at forða fyri hesum.

Tað er greitt, at ein persónur sum Jóannes Patursson er sera áhugaverdur sum søguligur persónur. Tað er fyrst og fremst hansara politiska virksemi, sum hevur søguligan týdning og áhuga, men aðrir persónligir eginleikar og annað virksemi gevur jú eisini eina meira fjølbroytta mynd av manninum. Hinvegin kunnu einkultstandandi hendingar og pástandir beinleiðis geva skeiva heildarmynd av einum persóni, líka mikið hvør hann er.

Jóannes Bóndi varð føddur fyri 140 árum síðani. Tað var bert nøkur fá ár eftir, at monopolhandilin varð avtikin og stutt aftan á, at Løgtingið varð endurreist. Hann var longu tíðliga politiskt og samfelagsliga »vaktur«. Tað sæst longu meðan hann er á skúla í Noregi, og sæst týðiliga á jólafundinum í 1888 og stovnanini av Føringafelag í 1889. Hann var sum heilt ungur valdur á Løgting og sat har til hann segði seg frá í 1946, tá hann fyllti 80 ár. Hann livdi sostatt eitt langt lív og luttók í politikki alt sítt vaksna lív. Á ævi hansara broyttist nógv í Føroyum, og hann hevði beinleiðis ávirkan á nógv av tí.

Eingin persónur er ella var lýtaleysur, hvørki núlivandi ella deyður. Men ynski um at geva eina so fullgóða mynd sum møguligt av einum persóni, heimilar ikki til at koma við einkultstandandi pástandum, sum partvís eru veikt dokumenteraðir og partvís hava lítlan týdning í heildarmyndini. Serliga ikki tá beinleiðis endamálið er at broyta søguligu myndina og *»seta viðkomandi upp á pláss«.(citat RG).*

Tey fakta Rolf Guttesen førir fram eru:

At *»JP hevði norska nazistin Adolf Hoel sum gest og agitator í Føroyum. JP visti, at Hoel var nazistur«.*

At *»JP ikki bert eina ferð skrivaði í í norska fascistavinarliga tíðarritinum Norsk Årbog. JP visti um linjuna í hesum riti«.*

Spurningurin um dømingina og bedømingina av Hoel er fyrst og fremst eitt norskt mál, og tað sindrið eg havi kannað um mannin vísir, at norðmenn ikki bara hava negativt at bera honum, tvørturímóti.

Eg havi kannað eitt sindur um Norsk Årbok eisini. Har stendur, at bókin kom út í tíðarskeiðinum 1920-39, men steðgaði í samband við hersetingina. Bókin verður umrødd sum eitt týdningarmikið skrift hjá málrørsluni, og eitt savningarmerki fyri málfólk, sum vardu tað klassiska nýnorska málið.

Tá ið atlit verður tikið til tíðina í triatiárunum verður torført at døma Jóannes Patursson fyri nakran »karakterbrist«, tí hann hevði havt samband við nevndu persónar og tíðarrit.

Rolf Guttesen avnoktar, at hann hevur skrivað sína grein í illsinni og hatri. Tað kann hann sjálvandi gera, men orðalagið vísir nakað annað. Eg má tí endurtaka tað sum eg skrivaði fyrru ferð, tað eru beinleiðis sitat úr greinunum hjá RG:

*»Tíverri er eingin søgumaður, mær vitandi, sum hevur sett handan reaktionera bóndan upp á pláss. Hann var ein miðaldarleivd. Í 1930 var hann nazi-vinur.«*

*»Hann dró norskar nazistar til Føroya at agitera móti Danmark og fyri Anschluss til Noreg.«*

*»Hann var eitt umvandrandi, miðaldarligt fossil«.*

*»Hetta er Junkarin, góðseigarin, miðaldarleivdin, ein stokk-konservativur politikkari.«*

Tað er støðið í skrivingini, sum eg reageri ímóti. Rolf Guttesen kann hava hvørja meining hann vil fyri mína skuld, bæði um Jóannes Patursson og eitthvørt annað mál. Men av einum universitetslektara eigur ein at krevja ein ávísan kvalitet.

Til seinast skal eg bert viðmerkja, at eg framvegis eri púra sannførdur um, at tað er sjálvstýrisrørslan og tjóðskaparkenslan, sum er grundarlagið undir øllum framburði í bæði Føroyum og einum hvørjum landi. Tá hon og kenslan av samleika eru burtur, er stórur partur av lívsvirðunum burtur.

# Hans P. Strøm og fólkateljing

EYÐUN M. VIDERØ



Í hesum døgum verður rættiliga nógv tosað í fjølmiðlunum um ætlanina at hava fólkateljing í Føroyum.

Í mínum oyrum tykist hetta vera ein sera einkul uppgáva, tí her er væl treytin at duga lítlutabell og at hava vanligt vit og skil, men frá ovastu myndugleikunum verður hetta gjørt til eina nærum óloysiliga uppgávu, sum kanska kann loysast vit at seta bólkar og nevndir at fyrireika arbeiðið!

Helst skilji eg ikki uppgávuna, havi ikki fylgt nóg væl við í tíðindasendingunum, og tí eri eg ikki greiður yvir, at hetta snýr seg um meir, enn at duga at jelja frá 1 til umleið 50.000.

Men við at fylgja við í starvslýsingunum hjá tí almenna og síggja førleikakrøvini til øll møgulig støv, so verður henda fólkateljing gjørt til meir enn tað, ið eg við mínum áhuga fyri ættarkanning kenni til fólkateljingar í t. d. 1800-talinum. Tá varð ein vanligur skilagóður bygdamaður settur til uppgávuna, og eg eri ikki kunnugur við nakra klagu um arbeiði teirra, men kanska eru fólk í dag meiri "innviklað" at telja!

Vit hava eitt væl útbygt fólkayvirlit, so hvat meiri skal til? Leita tit eftir ólógligum ikki skrásettum innflytarum? Skattaborgarar í skattligu gráusonu eru í fólkayvirlitinum!

Ella snýr hetta seg um á mystiskan hátt at upphevja uppgávuna og gera seg "sjónligan"? Tí er málið so einkult, sum eg haldi, so verður ætlaði arbeiðshótturin bert ein óneyðug fíggjarlig byrða hjá landskassanum, og síðan verður tað ein "æra" og eitt gott fíggjarligt íkast hjá teimum, ið skulu manna bólkar og fólkateljingarráð!

Eg skal gjarna aftan á eina frágreiðing viðganga mín vána kunnleika um uppgávuna. Í hesum sambandi komi eg í tankar um ein gamlan húsavíking, sum mátti gevast við at selja mjólk frá mjólkineytum í kjallaranum, tí nú vóru funnar so nógvar bakteriur í mjólkini, at henda er skaðiligt at drekka. Hann spurdi, hvussu fólk so kundu liva inntil nú, men har kom einki svar, uttan at hesi lærdu høvdu funnu milliónir av barterium í einum dropa av mjólk.

Tá øtaðist hann yvir evnini hjá fólki nú á døgum at telja!

## Sambandsflokkurin Mikli - 100 ár:

# Fullur av saft og kraft

MARJUS DAM
løgtingsmaður



Eg fari at takka Rolf Guttesen og Virgari T. Dalsgarði fyri teirra upplýsingar og ávdúkingar á 100 ára degnum.

Tað er ein veruleiki, sambært upplýsingunum, at J. Patursson undan seinna veraldarbardaga hevði kontaktir til ein óhepnan politiskan bólk av norðmonnum. Tað er sera vánaligt av blaðmanni á Sosialinum at royna at nýta eitt »óheft« blað at niðurgera ein flokk á 100 ára degnum. Vil Sosialurin gjalda løn til slíkt virksemi?

Sambandsflokkurin er tann flokkur í Føroyum, ið uttan nakað kjak hevur havt størstu positivu ávirkan í føroyskum politikki seinastu 100 árini. So einfalt er tað. Hví kanna somu journalistar ikki, hvussu nógvar milliónir danskar krónur Norðuratlansbólkurin brúkar fyri at royna at loysa í Føroyum. Er tað rætt at nýta danskar nassarakrónur til at føra loysingarpolitikk fyri í Føroyum. Er tað rætt at Kubik, Hoydal & Co skulu ferðast land og rige runt fyri at loysa, goldið av kassadamuni í Netto? Klárar loysingin seg ikki uttan fleiri milliónir danskar krónur árliga? Er tað rætt at danski staturin skal finansiera undirgravingarvirksemi hjá Høgna Hoydal? Hetta líkist 5. kolonnu virksemi. Sambandið hevur støði og styrki í Føroyum og føroyinginum.

Nú Sambandsflokkurin er 100 ár, kunnu føroyingar ynskja sær sjálvum tilukku. Hesin stóri flokkurin er flokkurin hjá flestu føroyingum – og er størsti politiski flokkur í Føroyum á 100 ára degnum. Vit hava eitt greitt og høgt mál. Nevniliga vælferð føroyinga. Tjóðveldisflokkurin vil ofra vælferðina fyri loysing. Um alt skramblar saman her á landi, so vilja teir loysa.

Hesa skaðiligu politisku ideologi er Sambandsflokkurin eitt bolverk ímóti. Vit verja føroyingin og føroysk áhugamál. Føroyingar skulu kunna búgva í Føroyum.

Í sambandi við 100 ára haldið er ein snotulig Sambandssøga komin út í bók. Eitt valaverk, ið flestu føroyingar vónandi koma at ogna sær.

Nøkur loysingarfólk hava fingið tannabyld, nú Sambandsflokkurin bæði er elsti og størsti flokkur. Sum ein kundi vænta, segði Hergeir Nielsen tilukku á 100 ára degnum við einum bakbiti. Ógvuliga vánaligt má sigast. Allir eru tó ikki so grundarringir. Tórbjørn Jacobsen segði eitt hjartaliga tillukku, og tað skal hann hava tøkk fyri. Men vit eru størstir og 100 ár.

Í samband við at J. Patursson beinleiðis varð í yvirskriftini hjá Sosialinum í smb við 100 ára dagin hjá Sambandsflokkinum – líkasum fyri at royna at niðurgera Sambandsflokkin, eru nakrar søguligar avdúkingar komnar fram. Ella rættari, nøkur fakta, ið ikki eru at síggja nakrar staðir, hóast keldur eru um viðurskiftini. Nakað, sum loysingarhugaðir søgufrøðingar ongantíð hava nevnt áður. Tað at stórir partar av politiskum virksemi í eitt heilt tíggjuáraskeið heilt verður gloymt, líkist mest manipulatión og søgufalsan.

## Hatta hevur tú misskilt, Marjus Dam!

Tá Marjus Dam, løgtingsmaður, í lesarabrævinum omanfyri skjýtur blaðmanni og Sosialinum órein motiv í skógvarnar í sambandi við greinina um bókina um Sambandsflokkin, havi eg sum blaðstjóri nakrar viðmerkingar:

Anja Andreassen, sum hevur skrivað bókina um Sambandsflokkin, átti sjálv orðini um Jóannes Patursson. Vit á redaktiónini hildu júst hesi orð lýsa sakina sambært henni: At tað eru tey sjálvstýrishugaðu, sum hava myndað føroyska søguskriving, at tey eisini vóru droymarar, meðan tað vóru sambandsmenninir, sum vóru teir »skikkiligu« realpolitikararnir.

Til stuttleikar kann eg nevna, at á samkomuni hjá Sambandsflokkinum í Norðurlandahúsinum á 100 ára degnum 18. august, tosaði eg við rættuliga nógv sambandsfólk, sum als ikki skiltu, at Rolf Guttesen – og nú so langt aftaná eisini Marjus Dam – tók sær tykni av hesum, og tað skilji eg altso heldur ikki!

***Vinarliga***

***Eirikur Lindenskov***
***blaðstjóri***